# Gourmet verður írsk pub

**Hans Andreasen, eigari av Glitnir, fer nú at gera eina írska pub í gomlum stíli við fólkatónleiki og skjótum búffum í hølunum, har Gourmet helt til**



*Hans Andreasen fer um stutta tíð at lata írska pub upp í hølunum, har Gourmet helt til*

PUB
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

»Vit hava okurs innkeypsprísir, høgar vín prísir, 25 prosent mvg og vit kunnu ikki seta prísirnar til tað, ið teir áttu at verið, tí tann føroyski marknaðurin er so lítil. Sum støðan er í dag, fremja karmarnir í Føroyum einans steakhouse-, pitsa- og barr- matstovur eftir útlendsk um leisti«, segði Leif Sørensen, fyrrverandi eigari av Gourmet, tá matstovan hjá honum uppi á loftinum á Glitni lat aftur.

Hans Andreasen, eigari av Glitni, má vóna, at orðini hjá Leif Sørensen eru rætt, tí seinast í apríl fara hølini, har Gourmet helt til, nevniliga at vera bæði barr- og steakhousematstova.

– Vit hava arbeitt við at gera eina orginala írska pub í hálvtannað ár, og seinast í apríl ella fyrst í mars skuldi verið klárt, sigur Hans Andreasen.

## Orginala pub

Ætlanin hjá Hansi Andreasen er at lata upp ein traditionella írska pub, har nógvir hálvveggir skulu geva eitt meiri intimt stað enn hini støðini í Havn.

– Vit skulu kunna bjóða bólkum av fólki at koma inn at hugna sær. Tey skulu fáa frið at sita, og so er meiningin, at tey skulu kunna fáa sær ein búff ella okkurt annað upp á fimm til tíggju minuttir, sigur Hans Andreasen.

Hann leggur afturat, at ætlanin á ongan hátt er at hava buffet.

– Tað gera øll hini, og fólk lata støð upp allastaðni, so vit mugu gera nakað, sum er eitt sindur øðrvísi, sigur Hans Andreasen.

## Fyri eldri

Málbólkurin hjá nýggju írsku pubbini, sum ikki hevur fingið navn enn, eru fólk, sum eru eitt sindur eldri.

– Vit fara at hava írska fólkatónleik um vikuskiftini, og eg veit ikki, hvussu væl ungu fólkini tíma Wild Rover og so framvegis, sigur Hans Andreasen.

Hann leggur afturat, at ætlanin er at borðreiða við orginalum írskum øli.

## Kostnaðarminni ætlan

Tað er kreppa allastaðni í heiminum, og hetta er vorðið ein fyrimunur, sambært eigaranum av Glitni.

– Vit fáa tað mesta bíligari enn vit roknaðu við upprunaliga, tí tað er ikki bara í Føroyum, at tað er kreppa, tí í Írlandi er virksemið eisini rættiliga lítið fyri tíðina, sigur hann.

Tó vil hann ikki koma nærri inná, hvat skal til fyri at pubbin skal kunna bera seg.



VER VIÐ AT VELJA

**Í ár skulu 12 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna. Endamál felagsins er m.a. at eiga partapeningin í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F og Betri pensjón P/F. Sum tryggingartakari kanst tú nú vera við til at velja hesi 12 umboð.**

**VALEVNINI ERU HESI:**
Andrass Skaalum, Velbastaðvegur 42, 100 Tórshavn
Andrias Ziska, Varðabrekka 3, 100 Tórshavn
Bergur Poulsen, Nýggivegur 6, 620 Runavík
Birgir Mohr, Sandabrekka 8, 210 Sandur
Durita Djurholm, Kristiansgøta 26, 188 Hoyvík
Egon Hansen, Fútalág 14, 100 Tórshavn
Heidi Kollsker, Andrasargøta 8, 188 Hoyvík
Hjørdis Viberg, Toftavegur 31, 650 Toftir
Jákup Suni Lauritsen, Traðarvegur 21, 380 Sørvágur
Jan Müller, Sleipnisgøta 10, 100 Tórshavn
Jona U. Nielsen, Undir Fossum 44, 700 Klaksvík
Jónsvein Knudsen, Á Heygnum 7, 620 Runavík
Mamy Dahl Sørensen, Djúpagilsvegur 36, 188 Hoyvík
Páll Petersen, Á Gørðum 5, 180 Kaldbak
Per Persson, Áargeil 21, 100 Tórshavn
Regin Hammer, Dýrindalsgøta 1, 188 Hoyvík
Rógvi Thomsen, Gøtuteigur 10, 850 Hvalba
Schandoff Vang, Undir Grótheyggi 12, 400 Oyrarbakki
Tóra við Keldu, Mylnugøta 38, 700 Klaksvík

**ATKVØÐURÆTTUR**
Atkvøðurætt hava øll, sum hava verið tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F síðan 1. januar 2010.

Tryggingartakarar, har árliga tryggingargjaldið er minni enn 50.000 kr., hava 1 atkvøðu. Fyri hvørjar byrjaðar 50.000 kr. í árligum tryggingargjaldi, fær limurin 1 atkvøðu afturat, tó í mesta lagi 10 atkvøður. Tað ber ikki til at atkvøða við fulltrú.

**ATKVØÐUSEÐIL OG TÍÐARFREIST**
Atkvøðuseðlar kunnu umbiðjast **frá 8. februar 2010 til og við 21. februar 2010.**

Atkvøðuseðil kann umbiðjast soleiðis:

- tel **345 600**
- fax **345 604**
- teldupost til **umbodsradsval@trygging.fo**

Tá atkvøðuseðil verður umbiðin, er neyðugt at upplýsa navn/ navn á virki, bústað og føðingardag.

Atkvøðuseðilin skal verða latin innaftur í seinasta lagi **26. februar 2010.**

**VALÚRSLIT**
Tá valúrslitið fyriliggur, verður tað almannakunngjørt í miðlunum.

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA